Vikuskiftis Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit vita, at støða tykkara er trupul, men allir amerikanarar vilja fegnir hjálpa tykkum*

*(George W. Bush í Kalifornia)*



*Sambært tekningini sær burturflytarin hjá Madeleine McCann soleiðis út*

# Hann rændi Madeleine

**Fyri fyrstu ferð er ein verulig tekning almannakunngjørd av manninum, sum sambært einum vitni burturflutti Madeleine McCann**

Millum tey mongu, sum eru avhoyrd í málinum um Madeleine McCann, er tann 36 ára gamla Jane Tanner. Hon og McCann-hjúnini eru vinfólk, og hon var á matstovu saman við teimum tað kvøldið, Madeleine hvarv.

Sambært Sky News er tað ein fyrrverandi agentur hjá amerikonsku samveldisløgregluni FBI, sum hevur gjørt tekningina út frá teimum upplýsingum, sum Jane Tanner hevur givið undir avhoyringum. Tekningin bleiv almannakunngjørd í einari spanskari sjónvarpsstøð.

- Vit halda, at tað var hesin maðurin, sum burturflutti Madeleine úr íbúðini, og vit halda tað hava stóran týdning, at almenningurin sleppur at síggja tekningina, sigur talsmaðurin hjá McCann-hjúnunum, Clarence Mitchell, við Sky News. Hann sigur, at hann og McCann-hjúnini vóna sjálvandi, at onkur kann kennast við mannin á tekningini, og at myndugleikarnir kunnu fáa boð um tað.

### Sá mannin

Tekningin vísir ein mann við einum barni í kneppinum, og tað dimma hárið bendir á, at talan er um ein mann úr einum landi við Miðjarðarhavið. Sambært Sky News er maðurin millum 35 og 40 ára gamal, 170 centimetrar høgur og heldur klænvaksin.

Jane Tanner skal undir avhoyringunum hava greitt frá, at hon sá mannin umleið klokkan 21.15 um kvøldið tann 3. mai, tá hon var á veg á matstovuna, har hon skuldi hitta McCann-hjúnini. Hon sá ikki andlitið á manninum, men helt seg síggja, at hann hevði skund.

Gerry og Kate McCann hava alla tíðina hildið uppá, at onkur var inni í íbúðini eftir Madeleine. Í høvuðsheitum byggja tey niðurstøðuna á tað, sum Jane Tanner hevur sagt, sigur Sky News.

# Mafian ætlaði at myrða Giuliani

**Ein fyrrverandi embætismaður hjá FBI vil vera við, at mafian í New York ætlaði at myrða Rudy Giuliani, sum nú roynir at gerast amerikanskur forseti**



*Rudy Giuliani á veljarafundi fyrr í vikuni. Fyri 21 árum síðani ætlaði mafian at beina fyri honum*

Sambært fyrrverandi FBI-agentinum løgdu tær fimm mafia-ættirnar í New York eina ætlan um at myrða Rudy Giuliani í 1986. Giuliani var tað almennur ákæri í býnum og var millum annað knýttur at fleiri rættarmálum um skipað lógloysi.

Tá ætlanin var klár, hittust leiðararnir í teimum fimm mafia-ættunum at taka endaliga støðu, men tá atkvøtt varð, vóru tvær atkvøður fyri at beina fyri ákæranum og tríggjar ímóti. Tískil bleiv drápsætlanin løgd til viks, skrivar blaðið The Telegraph og skoytir uppó, at hetta sama árið stevndi Giuliani teimum fimm mafialeiðarunum fyri rættin.

Upplýsingarnar um drápsætlanina eru komnar fram undir avhoyringum í sambandi við eitt mál, har ein fyrrverandi FBI-agentur er ákærdur fyri fýra morð, skrivar The Telegraph.

## STUTT SAGT

### Tony Blair skrivar ævisøgu

Fyrrverandi bretski forsætisráðharrin skrivaði í gjár undir sáttmála við bókaforlagið Random House, sum hevur fingið rættindini til at geva út bók við ævisøguni hjá Blair. Einki verður sagt um, hvussu nógv fyrrverandi forsætiaráðharrin fær fyri rættindini. Random House sigur, at Tony Blair ætlar sær at skriva ævisøguna sjálvur, men tað er ikki greitt, nær hon kemur út í bók.

### Kjarnorkuverk horvið

Fylgisveinamyndir vísa, at nakrir bygningar, sum hava hýst einum kjarnorkuverki í Sýrialandi, eru javnaðir við jørðina. Hildið verður, at talan er um sama verkið, sum ísraelsk flogfør bumbaðu tann 6. september. Serkøn halda, at ísraelsku bumburnar brutu hol á takið á verkinum, og at sýrar tí hava kvikað sær at beina alt burtur, áðrenn fylgisveinar kundu taka myndir niður ígjøgnum takið. Tey, sum hava sæð myndirnar, siga, at alt er beint burtur, og at tað als ikki ber til at síggja, at nakar bygningur hevur verið har.

### Nógvar neyðtøkur

330 kvinnur og nakrir menn vendi sær í fjør til neyðtøkuhjálpina í Keypmannahavn, tí onkur hevði neyðtikið ella roynt at neyðtaka tey. Ein triðingur av fráboðanunum var frá gentum ímillum 15 og 19 ár, og fjórða hvør fráboðan var frá kvinnum, sum vóru ímillum 20 og 24 ára gamlar. Níggju av teimum, sum vendur sær til hjálpina, vóru eldri enn 50 ár. Yær flestu neyðtøkurnar og neyðtøkuroyndirnar í Keypmannahavn vóru í sjálvum miðbýnum og á Amager.